# VÁGSBOTNUR

- EITT FØROYSKT MIKROKOSMOS -

71421



## Uppskot ið byggir á undanfarnu kappingar

Hjálagda uppskot er ein víðari menning av hugsanunum í vinnandi uppskotinum í arkitektakapping um miðbýin í 2014. Arbeitt hevur verið víðari við teimum amboðum og tonkum sum tað uppskotið legði upp til.
Yvirskipað eru tankarnir visión, strategi og konsept tikin við í tilgongdina av hesum uppskoti, sí tilfar til høgru.

Umframt tilfari á síðuni til høgru eru amboðini, ið eru lýst á næstu síðu nýtt. Hesi amboð leggja upp til í 4 stigum at menna býarrúmini. Tey eru lýst á komandi síðum og umfata 1) at taka forðingar burtur, 2) at lata bygningarnar upp móti gøtuni, 3) at leggja nýggjar og útvendar funktiónur inn, 4) at styrkja sambandi tvørturum býarrúmini.

# Tilfar úr vinnandi uppskoti í arkitektakapping 2014.







## visión tann margfaldi og samansetti býurin

Vit byggja ta nýggju heildarætlanina fyri Tórshavnar miðbý á visjónina um tann margfalda og samansetta býin. Taka støði í núverandi og heilt serligu samansetingini og strukturinum og teimum mongu menningarmøguleikunum, sum eru.

Framtíðarinnar miðbýur skal vera fyri øll, øll í Føroyum, bæði sosialt og í aldri. Tað er býurin, har fólk búgva, arbeiða, fara til handils og undirhald, íðka ítrótt ella bara njóta fríløturnar.

Okkara visjón fyri Tórshavn i framtíðini og tað, vit halda kann gerast nakað heilt serligt er, at allir hesir ymiskleikarnir kunnu gagna hvør øðrum og ávirka hvønn annan. Í framtíðini skal fokus verða á at ymiskleikar í ymisku løgunum sum saman skapa eina synergieffekt, so 2+2 verður nógv meir enn 4, og menningin fer fram i sínamillum samanspæli.

Í framtíðini fara stórir bygningar og smáir at standa saman, gamlir og nýggir, handil og mentan, bústaðir og vinna, arbeiði og frítíð. Stór og aktiv býarrúm eins og smærri og róligari, og vit fáa ein bý, har allir føroyingar hittast uttan mun til aldur ella sosialt tilknýti.

## strategi evolutión heldur enn revolutión

Vit halda, at framtíðar miðbýur gerst best við at hugsa framvøkstur heldur enn kollveltandi broytingar. Vit halda, at vit heldur eiga at byggja á núverandi styrki og menningarmøguleikar heldur enn at byrja av nýggjum ella broyta býarstrukturin radikalt.

Við strategiini evolutión heldur enn revolutión síggja vit býarmenningina sum eina gongd, sum allatíðina fer fram meir og minni og á ymiskum stigum. Politisk og fíggjarlig viðurskifti broytast støðugt og við eini býarmenning, ið gongur yvir eini 10-20 ár, er tørvur á eini haldgóðari, men eisini smidligari menningarstrategi.

Tað sum eyðkennir evolutión er, at hon fer fram bæði í smáum stigum og av og á í stórum lopum. Vit halda henda leið er tann rætta at ganga. Tí arbeiða vit við tí, vit kalla masterplanlegging og miniplanlegging. Stór, langtíðar projekt (masterplanlegging) sum til dømis eitt nýtt mentanarhús við Skálatrøð, og smá tiltøk (miniplanlegging) t.d. fleiri beinkir í býnum, ella tiltøk. Bæði master – og miniplanlegging eru týdningarmikil amboð, tá talan er um at menna Havnina.

## konsept stitching landscape

Havnin hevur í dag nógv av tí, sum skal til fyri at skapa nakað serstakt. Nýtt kann leggjast afturat, men tað er av stórum týdningi at fáa knýtt tað sum er meira saman. Við konseptinum Stitching Landscape skulu teir nógvu møguleikarnir, ið Havnin hevur, nú seymast ella knýtast saman til eitt samlað og vælvirkandi býarlandslag.

Í verkætlanini eru nógv ítøkilig tiltøk og hugskot, sum kunnu setast í verk alt fyri eitt, og fleiri meira yvirskipaðar visjónir fyri eini skipaðari menning, sum røkkur langt inn í framtíðina. Vit fara her at vísa á fýra ítøkilig amboð, ið ganga sum ein reyður tráður gjøgnum alla verkætlanina frá stórum til tað smáa. Harnæst ein yvirskipað visjónsætlan, sum hevur til endamáls greitt at vísa fysiska og funktionella strukturin, sum ymisk tiltøk í ætlanini arbeiða fram ímóti at skapa í miðbýnum í framtíðini. Síðan gjøgnumganga vit einstøku býarøkini.

Verkætlanin flytir seg sostatt ímillum tey bæði stigini master- og miniplanlegging, millum visjónir fyri at menna eitt øki og ítøkilig tiltøk á staðnum. Bæði hava stóran týdning fyri at fáa gongd í menningina her og nú og fyri at tryggja hana nógv ár fram.

## Tilfar úr vinnandi uppskoti í arkitektakapping 2014.



**MIÐBÝURIN Í DAG**

Nógvar av funktiónunum í miðbýnum eru í dag afturlatnar og hava ikki serligt tilknýti til býarrúm. Mørk og forðingar sum t.d. hǿgir garðar um tey grønu rúmini eins og ferðsla um vegastrekki skilja øki sundur.

Bilurin er ráðandi í nógvum av býarrúmunum, har fólk til gongu mugu ganga fram við jaðaranum og á smølum gongubreytum. Býarrúmini eru innrættað til gjøgnumgongd heldur enn at geva rúmd fyri steðgi ella aktiviteti. Í mongum førum eru býarrúmini ikki lagað til harða veðurlagið.



**A - TAKIÐ FORÐINGAR BURTUR - UPPRAÐFESTIÐ RÚMIÐ ÍMILLUM**

Verandi forðingar eiga at takast burtur og býarrúmið verður samlað. Samlaða víddin spennir frá veggi til vegg, so til ber at flyta seg allar vegir.

Rúmið ímillum verður uppraðfest við at innføra fleiri flexøki í goturúminum til ein steðg, hvíld, aktivitet, planting v.m. Flexøki verða staðsett eftir sólarviðurskiftum og lívd, tey stýra samstundis møguligari bilferðslu í gøtuni og noyða sostatt bilin at minka um ferðina.



**B - LATIÐ UPP**

Verandi funktiónir verða latnar upp og gjørdar til part av býarrúminum. Hetta kann gerast við at flyta almennar funktiónir í stovuhædd, lata fasaduna upp við størri glaspartíi og styrkja møguleikarnar at hava funktiónir úti í býarrúminum t.d. betri umstøður at hava vørur uttandura, servera úti o.t.

Smærri uppíbyggingar og bygging omaná eins og yvirdekkingar kunnu leggja nýggjar dimensjónir afturat almenna rúminum og gera sítt til at lata funktiónir upp serliga í sambandi við býarøki og flexøki.



## C - FÁIÐ FLEIRI NÝGGJAR ÚTVENDAR FUNKTIÓNIR

Umráðið verður gjørt tættari við nýggjum og útvendum funktiónum. Í summum økjum kann betrast við meira av sama slag (t.d. víðka handil í einum handilsøki fyri at styrkja funktiónina og skapa synergieffekt)

Í øðrum økjum ráða vit til at fáa nýggjar og øðrvísi funktiónir og harvið draga nýggjar brúkarabólkar til. Við at økja talið av funktiónum økist talið av sambondum í býnum, og møguleikin fyri samanspæli veksur.



## D - STYRKIÐ SAMBONDINI TVØRTUR UM ØKI

Sambondini millum ymisku økini í býnum verða styrkt, tey skapa soleiðis øðrvísi mynstur millum økini, har tað ber til.

1001 vegur gjøgnum býin mennast framhaldandi og nýggj ferðamynstur verða til. Málið er at taka burtur blindgøtur og forðingar, so at ymiskar loop-rørslur koma ymsastaðni í býnum. Sum vitjandi í miðbýnum skulu kunna ferðast frítt ímillum tær mongu upplivingarnar í býnum.



## MIÐBÝURIN Í FRAMTÍÐINI

rslitið av at arbeiða við teimum 4 amboðunum er ein býur, sum er tvinnaður saman, so íbúgvarnir kunnu hittast, og funktiónirnar umskarast og spæla saman.

Vit fáa ein bý við nógvum ymiskum býarrúmum og bygningum, har rúmið ella túnið ímillum er samlandi og ríkað við upplivingum heldur enn at skilja sundur.

## Vágsbotnur - eitt føroyskt mikrokosmos

Vágsbotnur er seinastu árini vorðin karmur um alskyns tiltøk, ið á ymiskan hátt umboða føroyska mentan og gerandisdagin. Sum eitt føroyskt mikrokosmos við smáum brellbitum av okkara mentan reu tiltøk sum Slaktið, Ein dagur á Grynnuni, Mentanarnáttin, jólabýurin ella ein heilt vanligur gerandisdagur í oktober, dømi um tað fjølbroytni, Vágsbotnur í dag er karmur um. Uppskotið leggur upp til, við heilt einklum átøkum, at skapa enn betri rammur um tey tiltøk, ið eru í Vágsbotni. Hetta skal gerast við smáum og einklum broytingum og innbúgvi, ið støðugt kann tillaga seg til skiftandi virksemi á Torginum.







# Tilgongd

# Konsept | 3 stig, ið skapa eitt liðiligt og livandi torg







### 1 | FORÐINGAR TAKAST BURTUR

Ymiskar forðingar s.s. vegbani, gongubreyt, stabbar, standmynd og aðrar forðingar skulu takast burtur fyri at skapa rúm fyri eini meira liðiligari innrætting av torginum í Vágsbotni.

### 2 | BELEGNINGUR FRÁ HÚSAVEGG TIL HÚSAVEGG

Fleiri ymisk sløg av belegningi eru í økinum í dag. Í framtíðini skal ein belegningur strekkja seg frá húsavegg til húsvegg. Hetta skapar ein samanhang á torginum og javnsetur bleyta og harða ferðslu (shared space). Smá frábrigdum í støðd og liti á flísunum eru eisini við til at eyðkenna smærru økini á torginum sum uppihaldsøki ella rørslu-øki.

### 3 | INNRÆTTING VIÐ BROYTILIGUM INNBÚGVI

Torgið verður skipað sum eitt opið torg uttan forðingar, ið kann hýsa alskyns tiltøkum. Lagt verður upp til at skipað torgið við broytiligum innbúgvi, tað er eitt hálvtak/telt, flytiligir plintar og eitt gosvatn-øki. Broytiliga innbúgvi verður síðan broytt og tillaga til ymisku tiltøkini alt eftir slag og støðd á tiltakinum og nær á árinum tiltaki er.

# Broytiligt innbúgv | hálvtak / telt + plintar + gosvatn







## HÁLVTAK / TELT

Torgið verður innrættað við 3 sløgum av broytiligum innbúgvi: hálvtak/ telt, plintar og gosvatn. Hálvtaki verður fest á Corten-stál-mastrar, ið kunnu snarast upp og niður eftir tørvi. Støddin á hálvtakinum / teltinum kann varierast eftir tørvi, og kann, tá tað ikki er í nýtslu, goymast í plintunum.

## FLYTILIGIR PLINTAR

Torgið verður innrættað við 3 sløgum og plintum úr føroyskum gróti: ein uppihalds- og søluplintur, ið ikki er gjørdur til plantur. Hini sniðini eru bæði gjørt til heilt ella partvíst at innihalda smærri trø og plantur. Allir plintarnir eru gjørdir soleiðis, at teir kunnu flytast runt á torginum eftir tørvi. Hetta verður gjørt við plattalyftara, ið er innbygdur í plintin.

## GOSVATN

Innbygt í flísarnar miðskeiðis á torginum, eru dysur til gosvatn.
Økið við dýsum er 3 x 20m til víddar. Gosvatni kann variera í stødd og styrki og tillagast til tiltøkini á torginum annars. Dysurnar eru senkaðar niður í belegningin og eru ikki til ampa fyri tiltøkini á torginum.

# Tilvísingar



RÚMLIG MYND AV TORGI



## OPIÐ, BROYTILIGT OG GRØNT TORG

Torgið í Vágsbotni verður skipað við so fáum "forðingum" sum møguligt. Hetta ger tað møguligt at innrætta og tillaga torgið til flest møgulig tiltøk. Áherðsla er eisini løgd á skapa eitt grønari Vágsbotn við meira plantuvøkstri.



## SEYRANDI FERÐSLA / SHARED SPACE

Torgið verður skipað so bilaferðsla framvegis kann vera á torginum, men við lágari ferð og vegurin verður skipaður sum partur av torginum ella sum Shared space. Lagt verður tó upp til, at tíðar ella árstíðaravmarkað bilaferðsluna frá Skálatrøð.



## ÚTISERVERING

Lagt verður upp til at skipa bila-ferðsluna soleiðis, at møguleikarnir at hava uttandura servering upp at húsaveggunum er góðir.



## GOSVATN

Gosvatn verður innbygd í flísabelegningin miðskeiðis á torginum. Gosvatni kann variera í støðd og styrki og kann eisini skipast so tað er samvirki við virksemi á torginum.



## FLÍSASTØDD EFTIR NÝTSLU

Lagt verður upp til at legga flísar á alt torgið, frá húsavegg til húsvegg, soleiðis at økið fær ein samlaðan dám. Flísarnir, ið eru úr granit, vera tó í ymiskum støddum og litbrigdum, ið hongur saman við nýtsluni/flowinum av ávísa økinum. Størri rørsla/flow = smærri flísar.



## UPPIHALD Á BRYGGJUBAKKANUM

Allur bryggjukanturin millum Vágsbotn og Skálatrøða verður nútímansgjørdur við trappum og uppihaldøkjum úr timbri. Eisini er lagt upp til at planta trø og runnar, ið skapa lívd fyri uppihaldi.

# Tilvísingar



RÚMLIG MYND AV TORGI



EIN GRØNARI VÁGSBOTNUR

Sum liður í at gera Vágsbotn til eitt enn betur stað til alskyns tiltøk, skal torgið vera meira grønt og lívdin betrast. Hetta verður gjørt í plintunum og fram við bryggjubakkanum. Planturnar skapa lívd fyri vestanættini í Vágsbotni eins og tær skapa samanhang millum Vágsbotn og Skálatrøð.



TRYGGJA MÓTI HØGARI FLÓÐ

Nýggja torgi verður uml. 20-30cm hægri enn verandi hædd. Hetta bøtir um umstøðurnar móti høgari flóð í framtíðini.



## UPPIHALDSØKI UNDIR TAKI

Torgið verður skipað við 13 smærri mastrum, ið eru innbygdar í belegningin og staðsettar miðskeiðis á torginum. Mastrarnar eru brúkaravinarligar og kunnu skjótt og lættliga snarast upp og niður eftir tørvi. Í mastrarnar verður festur ljósur og slitsterkur dúkur, hvørs snið refererar til eyðkendu húsini í Vágsbotni og maritimu søguna við seglum og sluppum, ið einaferð virkaðu í Vágsbotni.



## LYKTAPELAR

Tríggir nýggir lyktapelar verða smb. uppskotinum settir á torginum í Vágsbotni. Fyri at skapa samanhang við trappuna verður snið og tilfar eins og teir í trappuni.



## HÆDDARMUNUR VERÐUR TRAPPU OG UPPIHALD

Hæddarmunur millum torg og vágna verður loystur við trappum, ið líðandi møta undirlendinum.




## DRÁTTURIN Í VÁGSBOTNI ENDURSKAPAST

Søguligi drátturin í Vágsbotni verður endurskaptur og verður samstundis eisini til uppihaldsøki móti vágni.



## TILFAR: GRANIT, BASALT, TIMBUR, CORTEN

Tilfari, ið nýtt verður til torgið í Vágsbotni er eitt framhald av tí tilfari, ið verður nýtt í økinum í dag, t.e. Corten stál til lyktapelar, Azobe træ til bryggjukant, granit til flísar og føroyskt basalt til plintar.



## LIST Í VÁGSBOTNI - NÓLSOYAR PÁLL FLYTAST

Lagt verður upp til at flyta standmyndina av Nólsoyar Páll til Skinnarasker har hon kann standa rúmsháttari og tættari sjónum. Í staðin verður grafisk list á takinum gjørd í samstarv við Edward Fuglø, listamann.

# STØÐUMYND




STØÐUMYND | 1:300

## SKURÐIR




TVØRSKURÐUR A-A | 1:300




TVØRSKURÐUR B-B | 1:300


POULHANSEN HEILSØLA





# Útgreinan

# Plintar



## 3 SLØG AV PLINTUM

Partur av flytiliga innbúgvinum eru plintarnir úr føroyskum gróti. 3 sløg av plintum eru, ið allir kunnu flytast runt á torginum við plattalyftara eftir tørvi.
Hugsanin er, at fyriskiparar av tiltøkum skjótt og lætt kunnu innrætta og tillaga torgi til ymiskan tørv og nýtslu. Plintarnir eru sniðgivnir til ymiskt endamál. Tann heili plinturin er væl egnaður til m.a. uppihald, sølu og framvísingar. Tann hálvi plinturin (í miðjuni) kann bæði nýtast til uppihald, sølu og framvísingar, men er samstundis við til at skapa eitt grønari og meira innbjóðandi torg, umframt at skapa lívd. Triðja útgávan, er sniðgivin sum flytiligur plantikassi til smærri trø, ið eisini kunnu flytast runt á torginum.
Tá teir ymisku plintarnir verða staðsettir ymsa staðni á torginum rúma hesir lutfallsliga einklu plintar eina ørgrynnu av møguleikum og skapa rammur um tey mongu og ymisku tiltøkini, ið eru í Vágsbotni.
Plintarnir eru hugsaðir í sama tilfari sum trappan, tað merkir at síðurnar eru høgdar og yvirflaturnar eru flatar við sporum av diamantskeringini.





PLINTAR FLYTAST EFTIR TØRVI

9 PLINTAR = ÓTELJANDI MØGULIGAR INNRÆTTINGAR

Lagt verður upp til at torgið verður innrættað við 8 plintum, sum fyriskiparar og onnur kunnu staðseta á torginum sum teimum lystir.

# Hálvtak / telt







## STENGUR INNBYGDAR Í BELEGNINGI

Flísabelegningur verður skipaður soleiðis at stengur til hálvtak eru innbygdar í belegningin. Stengurnar kunnu snarast upp eftir tørvi.

## STENGUR UPPSETTAR

Stengurnar (Corten stál) eru snaraðar upp. Stengurnar eru ymiskar í longt fyri at skapa sniðið og hallið á taki / dúkin.

## HÁLVTAK / TELT UPPSETT

Taki / dúkurin verður spentum millum stengurnar og fær eitt húsalíknandi snið. Ikki er neyðugt at uppseta alt taki, eisini er møguligt at uppseta 1/3 ella 2/3 av tekjuni og á tann hátt tillaga yvirdekkaða økið til tørvin.



## SØGULIG & MARITIM SPOR SJÓNLIGGERAST Í TAKI

Hálvtekjan / dúkurin verður prentaður við grafiskari list, ið verður gjørd í samstarv við Edward Fugla, listamann. Tema fyri listina er søgulig spor og maritima umhvørvi í Vágsbotni.



## FJØLBROYTT VIRKSEMI UNDIR TAKI

Fjølbroytta virksemi í Vágsbotni kann við hálvtekjuni hýsa munandi fleiri uttandura tiltøkum.

# Gosvatn







### GOSVATNSØKI VIÐ NÓGVUM MØGULEIKUM

Partur av broytiliga innbúgvinum er innbygdu dysurnar til gosvatni. Økið við dysunum er skipað sum eitt grid á 3 x 20m til víddar og innanhýsisfrástøðan millum dýsurnar uml. 40cm. Dysurnar kunnu stýrast hvør sær og tillagast til staðsetingina av innbúgvinum.

### BROYTILIGT Í STØDD OG STYRKI

Umframt at kunna tillagast í vævi kunnu dysurnar tillagast í styrki (lodrætt). Á henda hátt kann gosvatni broyta munandi skap og atdráttarmegi yvir tíð. Tað kann gera lítið um seg ella vera livandi og bjóða til spæl. Henda broytingin kann vera støðug, soleiðis at gosvatni hevur eina stødd og styrki til eitt ávíst tiltak, ella, støðugt broytilig soleiðis at vævi og styrkin broytist allatíðina.

### LIVANDI OG SAMVIRKI

At vævi og styrkin á vatninum frá gosvatninum kann broytast ger tað møguligt at stýra upplivingini á gosvatninum og um tað t.d. skal vera við nógvum og stórum broytingum innbjóðar til spæl ella um tað er støðugt og bara “prutlar” virkar meira sum “bakgrundtónleikur”.

# Dráttur



### SØGULIGI DRÁTTURIN Í VÁGSBOTNI ENDURSKAPAST

Gamli drátturin, ið er avmyndaður á fleiri søguligum myndum úr Vágsbotni, verður endurskaptur. Umframt at skapa samband til søguliga virksemi í Vágsbotni, verður nýggi drátturin eitt nýtt uppihaldsstað móti vágni. Hetta verður sostatt eitt nýtt stað har fólk kann uppihalda sær heilt tætt at sjónum.



### DRÁTTUR TRYGGJAR MÓTI HØGARI FLÓÐ

Drátturin skal umframt at virka sum uppihaldsstað tryggja virksemi í Vágsbotni móti høgari flóð. Økið innanfyri (norðanfyri) dráttin verður hækkað nakað og hæddarmunurin millum sjógvin og torgin verður útjavnað við dráttinum.



### DRÁTTUR VERÐUR UPPIAHLDSØKI MÓTI VÁGNI

Drátturin verður skipaður sum stór trappu-trin, ið eru ætlað til uppihald. Trapputrinini verða úr dygdargóðum tilbri, Azobé, ið ofta verður brúkt í maritimum umhvørvi og er egnað til slíka nýtslu.

# Belegningur



### STØDDIN FYLGIR RØRSLUNI (FLOWINUM)

Støddin á flísunum avhongur av rørsluni har flísan liggur. Liggur flísan á einum strekki har bilaferðsla til tíðir er, gerst støddin á flísuni minni. Øvugt verður lagt upp til at uppihaldøki hava størri flísar, ið eru betri egnaðir til t.d. innbúgv sum stólar og borð o.a.




### FLÍSAR Í YMISKARI STØDD OG LITBRIGDI

Belegningurin er samansettur av granitflísum í ymiskari stødd og litum. Yvirflatan á steinum er eins, skríðsikkur og jetbrend. Jetbrenda yvirflatan skapar eitt fjølbroyttari úttrykk og tryggjar at flísan er skríðtryggjað.

# Ljós





## LJÓSMASTRAR SKAPA SAMANHANG

3 ljósmastrar eru teknaðar í prosjektinum. Hesar eru í sniði og tilfari eins og ljósmastrarnar í trappuni í Vágsbotni. Umframt at skapa góð ljósviðurskifti til ymisku tiltøkini á torginum, skapa ljósmastrarnar við sínum sniði og tilfari ein samanhang við uppihaldstrappuna, eins og tað refererar til maritima partin í Vágsbotni.

## SNIÐ OG TILFAR Á LJÓSMASTRUM

Sniði og tilfari á ljósmastrunum er eins og ljósmastrarnar í upphaldstrappuni í Vágsbotni.







# Møguleikar

# Tiltøk





## GERANDISDAGUR

Innrættingin av torginum við taki og plintum ein vanligan gerandisdag kann vera sum víst omanfyri. Staðsetingin av plintum eggjar til uppihald og t.d. sølu. Bilaferðslan kann seyra fram við miðjuni á torginum. Gosvatni kann er heilt ella lutvíst tendra.

## FRAMSÝNING

Innrætting av torgi til framvísing av t.d. ellisakførum. Plintarnir eru staðsettir burtur frá miðjuni á torginum., men tó ikki longur enn at teir bæði kunnu nýtast til uppihald og skapa lívd



## FRAMVÍSING VIÐ STÓRSKERMI

Framvísing av hondbólti og fótbólti hevur haft góða undirtøku síðan trappan bleiv tikin í nýtslu og veðrið hevur verið til vildar. Lagt verður upp til at víðka henda møguleikan við tveimum skermum og at skipa torgi við øllum plintunum samlaðum sum uppihaldøki.



## VOXBOTN

Tá tiltaki Voxbotn verður fyriskipað er brúkt fyri øllum tí plássi, ið er tøkt frammanfyri pallarnar. Í tí sambandi kundu plintarnir virka sum uppihaldøki í útkantinum av framførsluøkinum. Ein lítil partur av hálvtekjuni / teltinum kundi verið nýttur at hýsa mongu sølubásunum.

# Tiltøk







## SKOYTUBREYT

Skoytibreytin skal í framtíðini hava meira innbjóðandi rammur og betri pláss á torginum í Vágsbotni, soleiðis at hon eisini kann vera undir taki. Plintarnir staðsetast so teir eggja til uppihald umframt at skapa lívd móti sunnan- ella útsýnningsættini. Skoytibanin, og økið sum heild, kann upplýsast av lyktapelunum, ið eru staðsettir kring miðjuna.

## MENTANARNÁTT

Mentanarnáttin er eitt av størru tiltøkunum, ið hevur gang av rammunum í Vágsbotni. Torgið kann tá innrættast við plintunum á miðjuni og smærri básar ella mat-bilar í útkantinum av miðjuni. Miðjan kundi so verið nýtt sum spísi- og uppihaldsstað, parvíst ella heilt undir taki. Til tiltøk, har børn luttaka, eigur gosvatni at vera heilt ella lutvíst tendra.

## DISKARAKVØLD

Smidliga tillagingin við hálvtakinum/teltinum, heilt- ella partvíst uppsett, ger tað ómakaleyst at skipa fyri t.d. tónleikatiltøkum undir taki og plintar kunnu nýtast sum bæði pallur og uppihalds-amboð.







## MARKNAÐUR

Eitt tiltak, ið hevur verið í Vágsbotni í fleiri ár, er sølan av ymiskum føroyskum matvørum, eplum, grønmeti umframt ymiskar plantur. Hetta verður styrkt við betri og fleiri sølubásum, betri lívd og undir taki. Myndin vísir torgi undir taki, plintarnir á miðjuni verða nýttir sum sølubásar, uppihald og at geva lívd. Seyr-ferðsla er loyvt fram við torgi.

## EIN DAGUR Á GRYNNUNI/SLAKTIÐ

Eitt tiltak, ið veruliga savnar nógv fólk í Vágsbotni er Ein dagur á grynnuni. Til tiltøk sum hesi kann taki verða uppsett at skapa lívd og umstøður fyri mongu framsíningarstøðunum og fisk-kørunum. Plintarnir verða nýttir sum uppihald og sum ferðslu-avmarking av økinum.

## ÓLAVSØKA

Vágsbotnur er í nýggjari tíð meir enn onnur støð karmur um Ólavsøkukuna. Á Ólavsøku kundi hálvtaki/teltið verið uppsett at hýsa mongu sølubásunum, ið eru í Vágsbotni. Plintarnir kunnu nýtast til uppihald og spjaðast yvir eitt størri øki enn vannligt, tá ongin bilaferðsla er í økinum.


Andr. í Vágsbotni
osialurin



# Kostnaðarmeting

# Innleiðandi kostnaðarmeting

## Anleggsarbeiði

| | | Nøgd | | Eindarprísur | | Kostnaður | | Samlaður kostnaður | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **Fyrireiking** | | | | | | | **20.000** | **kr.** |
| 1.1 | Uppmáting av økið v. landmálara | 1 | stk | 20.000 | kr. | 20.000 | kr. | | |
| **2** | **Rudding og jørðarbeiði** | | | | | | | **2.175.500** | **kr.** |
| 2.1 | Upptøka av verandi flísum í Vágsbotni | 300 | m² | 250 | kr. | 75.000 | kr. | | |
| 2.2 | Upptøka av sandi undir flísum | 300 | m² | 150 | kr. | 45.000 | kr. | | |
| 2.3 | Upptøka av asfalt | 1.400 | m² | 120 | kr. | 168.000 | kr. | | |
| 2.4 | Nýggjur uppbygnaður undir flísum | 1.700 | m² | 300 | kr. | 510.000 | kr. | | |
| 2.5 | Niðurtøka av ljósi og býarrúmsinnbúgvi | 6 | stk | 10.000 | kr. | 60.000 | kr. | | |
| 2.6 | Flyta standmynd (Nólsoyar Páll) | 1 | stk | 30.000 | kr. | 30.000 | kr. | | |
| 2.7 | Upptøka av skráa framvið bryggjukanti | 50 | m² | 250 | kr. | 12.500 | kr. | | |
| 2.8 | Víðkan av bryggjukanti. (stuðlaveggur og uppfylling) | 1 | sum | 1.200.000 | kr. | 1.200.000 | kr. | | |
| 2.9 | Betongkantur, beð framvið bryggjukanti | 4 | m³ | 10.000 | kr. | 40.000 | kr. | | |
| 2.10 | Rampa ml. torg í Vágsbotni og Undir Bryggjubakka | 1 | stk | 20.000 | kr. | 20.000 | kr. | | |
| 2.11 | Betongkantur í forleing. av rampu móti U. Bryggjubakka | 2 | m³ | 7.500 | kr. | 15.000 | kr. | | |
| **3** | **Álegging** | | | | | | | **5.205.000** | **kr.** |
| 3.1 | Flísabelegningur í ymiskum støddum, ymisk litað granit | 1.700 | m² | 2.800 | kr. | 4.760.000 | kr. | | |
| 3.2 | Frámerking av vegbana v. vegaseymum | 150 | m | 350 | kr. | 52.500 | kr. | | |
| 3.3 | Nýggir kansteinar móti bryggjukanti. (Trin og benkir) | 75 | m | 1.500 | kr. | 112.500 | kr. | | |
| 3.4 | Leiðilinjur v.m. fyri sjónveik | 100 | m | 1.000 | kr. | 100.000 | kr. | | |
| 3.5 | Dysur feldar niður í flísar (springvatn) | 360 | stk | 500 | kr. | 180.000 | kr. | | |
| **4** | **Útbúnaður** | | | | | | | **632.500** | **kr.** |
| 4.1 | Plintur úr føroyskum gróti, massivur (1500 x 1500mm) | 4 | stk | 25.000 | kr. | 100.000 | kr. | | |
| 4.2 | Plintur úr føroyskum gróti, útskorin (1500 x 1500mm) | 5 | stk | 32.000 | kr. | 160.000 | kr. | | |
| 4.3 | Benkir / setur úr Azobé viði á trin móti bryggjukanti | 75 | m | 4.000 | kr. | 300.000 | kr. | | |
| 4.4 | Annað innbúgv (nýtt gonguteigskelti, blindvegurskelti) | 1 | sum | 30.000 | kr. | 30.000 | kr. | | |
| 4.5 | Ruskíløt úr føroyskum gróti | 3 | stk | 7.500 | kr. | 22.500 | kr. | | |
| 4.6 | Súkklustativ úr Cortenstáli | 1 | stk | 20.000 | kr. | 20.000 | kr. | | |
| **5** | **Skáli (Paviljong)** | | | | | | | **570.000** | **kr.** |
| 5.1 | Segldúkur / sólsegl | 1 | stk | 150.000 | kr. | 150.000 | kr. | | |
| 5.2 | Stengur v. faldingarrás | 14 | stk | 30.000 | kr. | 420.000 | kr. | | |

| 6 | **Gróður** | | | | | | | **125.000** | **kr.** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6.1 | Trø í plintar | 5 | stk | 10.000 | kr. | 50.000 | kr. | | |
| 6.2 | Plantur og trø í beð | 30 | m² | 2.500 | kr. | 75.000 | kr. | | |

| 7 | **Leiðingar / kloakk** | | | | | | | **110.000** | **kr.** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7.1 | Umleggingar av rørum og kaðalum | 1 | sum | 30.000 | kr. | 30.000 | kr. | | |
| 7.2 | Nýggj rist móti springvatni | 40 | m | 2.000 | kr. | 80.000 | kr. | | |

| 8 | **El** | | | | | | | **192.500** | **kr.** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8.1 | Ljós mastrar | 3 | stk | 30.000 | kr. | 90.000 | kr. | | |
| 8.2 | Up-light á trø og plantur í beði móti bryggjukanti | 5 | stk | 7.500 | kr. | 37.500 | kr. | | |
| 8.3 | Stýring til springvatn | 1 | stk | 15.000 | kr. | 15.000 | kr. | | |
| 8.4 | Annað el-arbeiði | 1 | sum | 50.000 | kr. | 50.000 | kr. | | |

| 9 | **Fyribils atkommuvegur og skipan av ferðslu í byggitíð** | | | | | | | **75.000** | **kr.** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9.1 | Fyribils skelting og skipan av ferðslu undir bygging | 1 | sum | 75.000 | kr. | 75.000 | kr. | | |

| 10 | **Aðrar byggiútreiðslur** | | | | | | | **2.731.650** | **kr.** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10.1 | Byggiplássútreiðslur 10% | 0,10 | | | | 910.550 | kr. | | |
| 10.2 | Óvæntaðar útreiðslur 20% | 0,20 | | | | 1.821.100 | kr. | | |

| | **Tilsamans u. MVG** | **11.837.150** | **kr.** |
|---|---|---|---|

## Notat - Kostnaðarmeting av torg í Vágsbotni

Kostnaðarmetingin umfatar eitt økið uppá 1700m2 í Vágsbotni. Talan er um eina innleiðandi kostnaðarmeting, ið tekur útgangsstøði í hjálagda skitsuuppskoti.

Verkætlanin fyri Vágsbotn umfatar víðkan av bryggjukanti, nýggjan belegning, nýggj uppihaldsøkið og benkir, nýggj trø og plantur og nýggj ljós umframt nýggjan skála (paviljong). Verkætlanin umfatar ikki broytingar á bygningar.

Av tí at kostnaðarmetingin tekur útgangsstøði í lutfallsliga yvirskipaðum skitsuuppskoti er í kostnaðarmetingini roknað við einari óvissu uppá 20%.

Byggiplássútreiðslur er sett til 10%, ið er lutfallsliga høgt. Tá ið talan er um eitt prosjekt á einum trafikeraðum øki, verður kortini mett at tað kunnu framstanda torgreidd viðurskifti undir byggingini.